Jólablaðið

# Ársins jólahandil

**Jólaredaktiónin:**


Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo


Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo


Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo


Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo


Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

Lagt til rættis: Ása A. Østerø, Anna Poulsen, Snorri Brend

## Nær lata tit gávurnar upp


***Heri Müller (28), Kvívík***
*Vit lata gávurnar upp aftaná kirkju, um 19-20 tíðina*


***Johannes Falkenberg (15), Hoyvík***
*Aftaná vit hava etið*


***Miriam (34), Sandavágur***
*Vit lata gávurnar upp jólaaftan, aftaná náttverða*



***Jóhan Davidsen (55), býr í Havn, men ættaður úr Æðuvík***
*Jólaaftan lata vit gávurnar upp*


***Elisabeth Andreassen (15), Hoyvík***
*Vit lata gávurnar upp , tá ið vit eru liðug at eta*


***Rut Dam (74), Argir***
*Vit lata gávurnar upp jólaftan*

## Glyvra kirkju

**Náttarkirkjan**

Í kvøld, 10. desember letur NÁTTARKIRKJAN upp dyrnar í Glyvra kirkju.

Náttarkirkjan, ið er ein øðrvísi og eksperimenterandi kirkja, vendir sær til ungdómin, men øll áhugaði eru vælkomin.

Á skránni verður lovsangur, tónleikur, sangur við ungdómskórinum á Glyvrum, jólatræ og jólahjørtu, andakt, glowsticks, altargangur og náttcafe byrjar klokkan 21.

**Syngja jólini inn**

Sunnudagin kl. 17, sum er 3. sunnudagur í advent, fara tey at syngja jólini inn í Glyvra kirkju.

Kæru og alkendu jólasálmarnir verða sungnir. Kór Glyvra kirkju, ið telur uml. 30 sangarar, og Barnakór Glyvra kirkju, ið telur uml. 60 børn, koma eisini at seta dám á løtuna.

Kórini syngja hvør sær, men tey koma eisini at framføra onkran sangin saman. Aftaná verður ein nátturðabiti at fáa.

